# Sjúkrarøktarfrøðingar tóku læknaavgerðir

**Tá ið verkfall var, og leiðslan á Landssjúkrahúsinum tók avgerð um at avlýsa allar ikki bráðneyðugar skurðviðgerðir, vóru avvarðandi læknar ikki altíð kunnaðir um hetta**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



Tá ið sjúkrahúsleiðslan hevði tikið avgerð um at avlýsa allar skurðviðgerðir, ið ikki vóru bráðneyðugar, var hetta gjørt uttan um fleiri av avvarðandi læknum. Í onkrum føri var tað, sum skilst, enntá ein sjúkrarøktarfrøðingur, ið gjørdi av, um talan var um bráðneyðuga skurðviðgerð ella ikki.

**Tóku læknafakligar avgerðir**

Tá ið Jóhan Petur Davidsen, uppsagdur yvirlækni, frætti, at yvirsjúkrasysturin á skurðdeildini hevði avlýst fleiri av ætlaðu skurðviðgerðunum hjá honum eftir øllum at døma við vælsignilsi frá sjúkrahúsleiðsluni, var hann ikki blíður.

Jóhan Petur Davidsen tók so ógvusligani til í hesum sambandi, at sjúkrahúsleiðslan ynskti at siga hann úr starvi. Jóhan Petur Davidsen kundi ikki góðtaka, at sjúkrarøktarfrøðingur tók læknafakligar avgerðir.

Hóast ákæruritið móti Jóhan Petur Davidsen, sum Sosialurin hevur fingið hendur á, bert viðgerð ósemjur í leiðsluhøpi, ynskir sjúkrahúsleiðslan at siga hann úr starvi sum tænastumannasettur yvirlækni eisini.

Sum skilst kunnaði Jóhan Petur Davidsen sjúkrahúsleiðsluna á fundi tann 19. oktober um, at hann ikki kundi góðtaka, at sjúklingaviðgerðir hjá honum vóru avlýstar, uttan at hann var vitandi um hetta. Dagin eftir fekk Jóhan Petur Davidsen bráddliga at vita, at sjúklingarnir vóru kallaðir inn aftur, og heldur ikki hesaferð varð hann kunnaður um hetta.

Sum skilst á læknum, er væntandi, at avgerðin hjá sjúkrahúsleiðsluni um at lata sjúkrarøktarfrøðingar taka avgerð um, hvat er bráðneyðug skurðviðgerð og hvat er ikki, verður kærd til landslæknan.

Poul Geert Hansen, sjúkrahússtjóri:

# – Vit eru setanarmyndugleiki

**Sjúkrahússtjórin er ikki samdur við Christian Andreasen, advokati hjá Jóhan Petur Davidsen, sum vil verða við, at avgerðin at koyra uppsagda yvirlæknan til hús er ógyldug**

UPPSAGDUR YVIRLÆKNI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



Poul Geert Hansen sigur, at sambært lóg er sjúkrahúsleiðslan setanarmyndugleiki á Landssjúkrahúsinum, men ikki uppsagnarmyndugleiki, tá ið talan er um uppsøgn uttan umsókn.

Hann heldur tískil ikki, at tað var ein ógyldug avgerð, ið sjúkrahúsleiðslan tók, tá ið hon sendi Jóhan Petur Davidsen til hús.

**Fleiri vóru misnøgd**

Spurdur hvussu tað ber til, at Landssjúkrahúsið valdi bert at gera bráðneyðugar viðgerðir, meðan verkfall var, samstundis sum Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús koyrdu við fullari megi, sigur Poul Geert Hansen:

– Vit eru meginsjúkrahús, og tí er nógv meiri virksemi sum heild á Landssjúkrahúsinum, enn tað er á hinum báðum sjúkrahúsunum. Vit eru fyri so vítt eisini megingoymsla fyri alt sjúkrahúsverkið. Vit viðgjørdu málið í leiðsluni og í leiðslubólkinum, og avgerðin bleiv so tikin, hóast tað vóru fleiri, sum ikki vóru nøgd við avgerðina. Í einari organisatión vilja tað tó altíð verða summi, sum eru misnøgd, sigur Poul Geert Hansen.

Sjúkrahússtjórin hevur annars ikki hug til at gera tær stóru viðmerkingarnar til málið, tí talan er um eitt persónsmál.

# Aðrir yvirlæknar vóru eisini misnøgdir

**Tað var ikki bert Jóhan Petur Davidsen, uppsagdur yvirlækni, ið var misnøgdur við avgerðina hjá sjúkrahúsleiðsluni um at steðga øllum ikki bráðneyðugum skurðviðgerðum undir verkfallinum**

UPPSAGDUR YVIRLÆKNI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í einum notati, sum Tummas í Garði, læknastjóri, hevur skrivað, og sum Sosialurin hevur fingið hendur á, verður greitt frá eini telefonsamrøðu millum læknastjóran og Eliesar Olsen,yvirlækna.

**Líkist svartasta ongum**

Í notatinum stendur at lesa, at Eliesar Olsen tann 19. oktober ringdi til Tummas í Garði og segði, at hann var sera illa nøgdur við, at leiðslubólkurin hevði tikið avgerð um, at allar ikki bráðneyðugar skurðviðgerðir skuldu avlýsast. Eliesar Olsen, yvirlækni segði við læknastjóran, at hann helt, at tað líktist svartasta ongum, at hann ikki kundi fáa loyvi til at fremja nakrar smáar skurðviðgerðir, ið hann hevði á skránni. Talan var um skurðviðgerðir, har honum ikki hevði nýtst stórvegis hjálp ella serliga nógv tilfar.

Tummas í Garði fasthelt tó, at talan var um eina undantaksstøðu fyri alt sjúkrahúsið, og avgerðin skuldi respekterast. Eliesar Olsen var kortini sera misnøgdur, og hann helt, at tað var ein býtt avgerð, sum varð tikin, men at hann kortini fór at fylgja boðunum frá leiðsluni.

## Sjúkrahúsleiðslan fór út um sína heimild

**Sambært advokatinum hjá Jóhan Petur Davidsen, uppsagdum yvirlækan, fór sjúkrahúsleiðslan út um sína heimild, tá ið hon sendi yvirlæknan til hús**

UPPSAGDUR YVIRLÆKNI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í skrivi dagfest 25. oktober til advokatin hjá Landssjúkrahúsinum sigur Christian Andreasen, advokatur, umboðandi Jóhan Petur Davidsen, at avgerðin hjá sjúkrahúsleiðsluni er ógyldug, og hann krevur tí, at hetta verður broytt beinanvegin.

**Ikki setanarmyndugleiki**

Christian Andreasen ger í skrivinum vart við, at sjúkrahúsleiðslan ikki er setanarmyndugleiki, og hann metir tí, at avgerðin hjá leiðsluni er ein ógyldug avgerð, og tí verður kravt, at hetta verður broytt beinanvegin.

Í skrivinum sigur Christian Andreasen, advokatur, eisini: »annars skal eg endurtaka, at grundgevingarnar fyri uppsagnini m.a. er, at Jóhan Petur Davidsen ikki skal hava aktað givin boð, og at talan tí er um disiplinær viðurskifti, og at Jóhan Petur Davidsen tí ikki kann sigast upp, uttan so at ein tænastumannasak er reist móti honum.

Hesa avgerð kann sjúkrahúsleiðslan heldur ikki taka, tí sjúkrahúsleiðslan er ikki setanarmyndugleiki«.

Somuleiðis sigur Christian Andreasen í skrivinum, at hann metir framferðarháttin hjá sjúkrahúsleiðsluni við at frítstilla Jóhan Petur Davidsen og innstilla hann til eina uppsøgn verða langt uttan fyri løgfrøðisligt mark, og advokaturin tekur tí fyrivarni um øll rættarstig í hesum sambandi.